# Gongur rætta vegin

**Petur Heðin á Fløtti, landsliðsvenjari í svimjing, heldur at menningin innan svimjingina gongur rætta vegin, og hann er spentur eftir at síggja úrslitini, nú kappast skal um FM**

SVIMJING
*Jákup Mørk*



*Landsliðsvenjarin í svimjin, Petur Heðin á Fløtti, er spentur undan FM-kappingini, og hann væntar sær nógvar góðar tíðir frá svimjarunum*

Tað er nú júst eitt ár síðani, at Petur Heðin á Fløtti varð settur sum føroyskur landsliðsvenjari í svimjing. Hetta var beint fyri FM-kappingina í fjør, og tá vóru fleiri atfinningar frá nýggja venjaranum. Millum annað segði, at toppurin í føroyskari svimjing var alt ov smalur, og at hetta var nakað, sum tey nú fóru at arbeiða miðvíst við at betra.

### Á røttu leiðini

Nú er eitt ár runnið, og tó at tað eitt slíkt arbeiði helst skal fara fram yvir drúgt áramál, so heldur Petur Heðin tó, at nakað er komið ávegis.

- Vit hava verið runt í ymsu feløgunum saman við svimjarunum á landsliðnum, soleiðis at hesi eisini hava fingið innlit í, hvussu vit venja, og vónandi kann hetta vera eitt skump rætta vegin. Í Klaksvíkini eru tey nú eisini um at sleppa í gongd aftur við svimjingini, og tað verður so avgjørt eisini nakað, sum kann seta ferð á.

Tað er kanska eisini soleiðis,at tað fyrst og fremst er við yngru svimjarunum, at eitt slíkt arbeiði skal gerast. Og landsliðsvenjarin frøddist eisini um, at fleiri bólkamet vórðu sett, tá SUM-kappingin varð hildin fyri stuttum.

- Kanska var ein av orsøkunum her, at svimjararnir vistu av, at 12 teirra fingu loyvi at koma til Hetlands at kappast, men ein slík gularót eigur altíð at vera. Tað viðvirkar jú til, at tey kýta seg tað lítla pettið eyka, soleiðis at tey støðugt kunnu betra seg, og tað er júst tað, sum alla tíðina eigur at vera málið hjá okkum.

### Útisetar taka lut

Eitt er, at yngru svimjararnir tykjast gerast støðugt betri, men ofta gongur rúm tíð, áðrenn veruligu úrslitini av hesum síggjast. Eitt nú hava rættuliga fá met verið sett í svimjingini hjá teimum vaksnu seinastu árini, men hesa ferð vónar Petur Heðin tó, at hetta kann broytast.

- Tað koma so í øllum førum tríggir svimjarar upp úr Danmark, sum heilt víst kunnu vera við til at lyfta støðið á kappingini. Eivind Eysturoy og Ásbjørn Hansen svimja báðir í Esbjerg, og teir koma upp, og so kemur Malan Michelsen, sum er ættað úr Suðuroy, men búsitandi í Danmark, upp til kappingina.

- Tað kann sjálvandi ikki sigast fyri vist, men eg rokni tó við, at hesi fara at seta onkur nýggj met. Ásbjørn og Eivind hava báðir betrað um sínar tíðir, nú teir hava svomið í Danmark, so vónandi kunnu teir veruliga gera um seg. Malan er ein av stinnastu svimjarunum í Danmark í sínum aldursbólki, og er so heilt víst ein svimjari, sum vit kunnu fáa gleði av á landsliðnum. Og so vænti eg mær eisini nógv av teimum hiemligu svimjarunum. Fleiri av hesum hava gjørt stór framstig, og einki er at ivast í, at vit fáa fleiri bólkamet.

Tað hevur annars ikki verið nøkur breið semja millum føroysku svimjararnar og svimjifeløgini, um at útisetar soleiðis bara koma heim, og kanska taka nógv burtur av føroysku metunum, men sjálvur heldur Petur Heðin, at hetta bara kann betra um støðið.

- Tað hevur altíð verið so, at teir svimjarar, sum svimja uttanlands, ikki kunnu seta føroysk met, tá teir svimja fyri útlendsk feløg, og tí eru hesi noydd at koma heim, um tíðirnar skulu viðurkennast í Føroyum.

- Ofta letur hetta seg ikki gera, og tað haldi eg avgjørt vera spell, tí verða metini betra, so viðførir hetta hægri krøv til heimligu svimjararnar, og tað kann so bara vera við til at hækka støðið.

Vansin í hesum er kanska, at heimliu svimjararnir fáa nøkur met at miðja eftir, sum tey als ikki hava møguleika at røkka. Til dømis høvdu tiðirnar, sum Jón Hestoy svam fyrst í 80'unum, framvegis verið langt undir verandi føroyska metini, men heldur ikki hesum er Petur Heðin samdur í.

- Mín meining um hetta er framvegis hin sama. Tað gevur svimjarunum nøkur enn størri mál at miðja eftir, og hetta kann bara vera við til at lyfta støðið. Bæði nú og framyvir.

### Til Íslands at kappast

Tað hevur ofta verið so, at árini ímillum Oyggjaleikirnar eru eitt sindur deydlig, tá tosað verður um met í føroyskari svimjing. Motivatiónin hjá svimjarunum hevur kanska ikki verið eins góð, sum tá Oyl stendur fyri framman, men nú eru so nøkur stig tikin, til tess at halda svimjarunum til øll árini.

Petur Heðin greiðir frá, at tá FM er liðugt, verður eitt landslið tikið út, sum fyrstu vikuna í juli fer til Íslands at taka lut í kappingini um íslendska meistaraheitið.

- Har taka svimjarar úr fleiri londum lut, og vónandi kann hetta vera við til at betra um motivatiónina hjá okkara svimjarum.

- Eftir hetta fara vit øll at hava frí í fýra vikur, og so verður lagt til brots í fyrireikingunum til Oyggjaleikirnar, 2003, sigur landsliðsvenjarin at enda.

# Bestu svimjararnir verða funnir

**Í kvøld, fríggjakvøldið verður farið undir FM-kappingina í svimjing, tá 80 av sterkastu svimjarunum í landinum fara at kappast um heiður og æru**

SVIMJING
*Jákup Mørk*

Á leið 80 svimjarar úr seks svimjifeløgunum fara alt vikuskiftið á tamb at kappast um føroyameistaraheitið í svimjing, sum fer fram í svimjihøllini í Havn.

Í alt verður talan um 38 kappingar, og umframt sjálvi FM-heitini, so verða Grand-Prix vinnararnir í yngru bólkunum eisini kosnir.

Seinnu árini hevur eisini verið siður at kjósa ársins svimjarar hjá bæði gentum og dreingjum, og hetta verður sjálvandi eisini á skránni í ár, umframt at besti svimjarin við FM verður funnin. Hetta verður gjørt eftir týsku skipanini, har stig verða givin fyri avrikini í ymsu kappingunum.

Sum nakað nýtt fer Svimjisambandið eisini at skipa fyri hugnaløtu fyri svimjarunum leygarkvøldið, og verður hendan hildin í HB-húsinum.

## Skráin

| | | |
|---|---|---|
| 21.06 | 18.00 | Innleiðandi umfør |
| 22.06 | 08.30 | Innleiðandi umfør |
| 22.06 | 14.00 | Finalur |
| 22.06 | 17.30 | Finalur |
| 23.06 | 08.00 | Innleiðandi umfør |
| 23.06 | 16.00 | Finalur |



*80 svimjarar úr øllum landinum fara um vikuskiftið at kappast um FM í svimjing*
*Mynd: Øssur Mohr*



# Flot færøsk start på bridge-EM

**Færørne er et af de store samtaleemner ved europamesterskaberne i bridge, der åbnede søndag aften i den norditalienske by Salsomaggiore**

BRIDGE

*Svend Novrup - Salsomaggiore*

Allerede ved åbningsceremonien lørdag aften var der betydelig opmærksomhed om det færøske hold I de klædelige nye uniformer, og to lande fik særlig stort bifald, da deres flag blev båret frem, værtsnationen Italien og _. Færørne

Der var også fuld opmærksomhed om åbningskampen, der stod mod de forsvarende mestre fra Italien. Ikke overraskende blev det til nederlag 0-25, men det gav ingen moralske skrammer. Det var man forberedt på, og så blev holdet som EM-debutanter spillet ind i en kamp, der under alle omstændigheder ville være tabt. I runde to blev kampen mod Tjekkiet tabt 9-21, men tjekkerne er indtil videre en stor overraskelse på den samlede 3. plads. Dermed overnattede Færøerne som nr delt 36 af 38 nationer.

Mandag indledtes med 11-19 mod et libanesisk hold, der lå på 2. pladsen, og efter dette hæderlige resultat fulgte sejre på 20-10 over Portugal og 19-11 over Slovenien. En dag, som med middle 45 indbragte 50 KP var et ualmindelig flot resultat, og på delt 32. plads kunne færingerne konstatere, at lige bag sig havde de _. Sverige og Danmark.

Tirsdag indledtes med tab 11-19 mod Schweiz, efter at Færøerne var kommet foran 17-0 på det første par spil. Derefter lukkede schweizerne imidlertid effektivt af, og der blev kun 2 IMP mere. Aktuel status er dermed 70 p for 6 kampe og en placering som nr. 33, dels med Danmark og med Sverige et point foran. I toppen har Italien 131 af 150 mulige trods et enkelt overraskende nederlag (mod Ukraine), mens Island har 120, Tjekkiet 117 og Holland 113. Norge ligger på delt 8. plads med 106.

Meget glædeligt er alle tre par velspillende, og såvel Bogi Simonsen – Roi Joensen som Hedin Mouritzen – Joannes Mouritzen og Hans-Jacob Petersen – Arnbjørn Sivertsen har prøvet at vinde.. De har hver deres force, og derfor kan holdene af Finn Ougaard og Svend Novrup stilles taktisk, så parrene møder de systemer, de spiller bedst imod . Det er en væsenlig del af årsagen til den gode start og vil bidrage til, at Færøerne så længe som muligt har tre par, der ikke bliver fysisk udslidt.

Desuden klarer alle færingerne sig glædeligt godt i hedebølgen med op til 43 grader i skyggen. Mange nationer har det anderledes svært.

Onsdag indledes damerækken, hvor de færøske damer er favorit til det, som englænderne kalder for træskeen (the wooden spoon). De har ikke megen international erfaring, og så godt som alle de svagere nationer, de kunne håbe at skulle møde, stiller ikke op. De er imidlertid ved godt humør og meget kamplystne, sa forhåbentlig bliver der også sejre til Marjun Restorff – Arnleyg Mikkelsen, Laila Danielsen – Maria Christiansen, Majken Johansen – Jona Grunnveit og holdkaptajn Mortan Rasmussen.

Færørnes storste gevinstspil indtil nu har været dette fra matchen mod Portugal:

Øst/Ingen

| | | |
|---|---|---|
| | 6 | |
| | 6 | |
| | ED742 | |
| | B10632 | |
| EKD32 | | B75 |
| KB987 | | ED5 |
| 83 | | 1095 |
| D | | E842 |
| | 10984 | |
| | 10432 | |
| | KB6 | |
| | B5 | |

Arnbjørn — Hans-Jacob meldte som Øst-Vest 4Sp, som de skulle, og tog deres 11 stik. 450 ind. Ved det andet bord sad Hedin — Joannes N-S

| **Vest** | **Nord** | **Øst** | **Syd** |
|---|---|---|---|
| | | **Pas** | **pas** |
| 1Sp | 2NT | D | 3Ru |
| pas | pas | 4Sp | pas |
| pas | 5Ru | pas | pas |
| D | pas | pas | pas |

Syds 3Ru var en positiv præference, så han havde noget reelt i ruder, og allerede ved at ofre i 5Ru havde Hedin — Joannes sikret sig bet godt spil. Varmen syntes imidlertid at gå Øst-Vest til hovedet i spillet. Vest trak Sp E, og Øst lagde Sp 2 som afvisning og et forsøg på at få ruder igen. Det forstod Vest imidlertid slet ikke, så han fortsatte med Sp 2, hvor bordet slap af med sin hjerter, og Syd vandt med Sp 8. Han spillede klør til D, K og E, og nu kunne Vest have fået en klørtrumfning. Da Øst imidlertid fortsatte i hjerter til trumf, vandt kontrakten, så Færøerne scorede yderligere 750 p, i alt 1300 og 15 IMP til færingerne.

# Flott byrjan hjá kvinnunum

**Í opnu røðini var tað eitt vónbrot, at føroyska landsliðið tapti fyri Finnlandi, men kvinnurnar skaptu eina veruliga sensatión við javnleiki móti Kekkia**

BRIDGE
*Svend Novrup skrivar*

So komu føroysku kvinnurnar í gongd í bridge-EM, sum verður spælt í Salsomaggiore, og ikki kann sigast annað, enn at byrjanin var góð. Undan EM hevði føroyska kvinnulandsliðið leitk 48 landsdystir, harav 47 vóru taptir. Einasti sigurin var í 1980 móti svenska landsliðnum.

Í EM byrjaði føroyska liðið við dysti móti Kekkia, sum stóð seg væl í fjør. Laila Danielsen – Maria Christensen og Majken Johansen – Jona Grunnveit fóru tó eldhugaðar undir uppgávuna, og hóast trupul kort, so høvdu tær gott tak á kekkisku kvinnunum. Eftir 15 spøl var støðan 38-37 til Kekkia, men enn vóru tveir truplir slemmar og eitt møguligt game eftir at spæla. Londini bæði meldaðu hvør sín slem, so endaliga støðan gjørdist 41-40, sum í dystarstigum gevur javnleik, 15-15. Ein veruliga flott byrjan hjá føroyska liðnum.

Avrikið gerst ikki minni gott, tá hugsað verður um, at tær báðar mest royndu, Marjun Restorff – Arnleyg Mikkelsen, ikki vóru við í hesum dystinum. Tær verða ístaðin við móti Onglandi, sum er tvífaldur europameistari, og har alt annað enn 0-25 er at meta sum eitt gott úrslit.

### Vónbrot móti Finnlandi

Hjá liðnum í opnu røðini var 10-20 fyri Ísrael og 14-16 fyri Írlandi heiðurlig tap, men 5-25 móti óstøðuga finska liðnum var eitt satt vónbrot. Enn eru nøkur lið undir Føroyum í samlaðu støðuni, men hesi gerast alt fleiri, um tað ikki koma nøkur stig á kontina skjótt. Helst skulu hesi koma móti Ungarn í 11. umfarinum, tí eftir hetta spæla Føroyar móti Pólandi og Russlandi, og tað er lítið sannlíkt, at hesi lata nakað serligt av stigum eftir sær. Tað skal tó viðmerkjast, at enn hava Føroyar ikki spælt móti nøkrum av liðunum í botninum, og tá skuldi verið møguleiki fyri at fingið nøkur stig.

Eitt lítið koriosum er annars, at Jóannis Mouritsen setir met, hvørja ferð hann spælir. Dysturin móti Finnlandi var hansara 60.

Vit enda við at vísa eitt gott spæl frá dystinum móti Írlandi. Bogi Simonsen – Rói Joensen Eystur-Vestur

N. Alle

| | | |
|---|---|---|
| | E532 | |
| | ED653 | |
| | K | |
| | K74 | |
| 10864 | | - |
| 2 | | KB1098 |
| 98532 | | EDB104 |
| B102 | | E85 |
| | KDB97 | |
| | 74 | |
| | 76 | |
| | D963 | |

| **V** | **N** | **Ey** | **S** |
|---|---|---|---|
| | 1Hj | 2Ru | 2Sp |
| 3Ru | 4Sp | 5Ru | D |
| pas | pas | pas | |

Kontraktin vísti seg at vera ósetilig, og gav 750 til føroyska liðið. Írarnir við hitt borðið settu 4SP einaferð. 12 imp til Føroyar.

# Langt millum ynski og marru

**Hjá øllum trimum føroysku feløgunum, sum í dag verða í hattinum í Genevé, er møguleikin at hitta feløg úr grannalondunum og feløg langt eysturi**

EUROPA CUP
*Jóannes Hansen*

Fyrrapartin í dag verður lutur kastaður í Genevé í Sveis um, hvussu tað skal spælast í innleiðandi umførunum í Europa Cup kappingunum í summar. Føroysku luttakararnir eru B36, KÍ og GÍ. Kristian á Neystabø, formaður í B36, og Markus Tummas Jacobsen úr KÍ eru hjástaddir í Sveis.

Undan lutakastinum eru liðini bólkaði. Tískil er tað greitt hvørji møguligi mótstøðuliðini hjá føroysku feløgunum kunnu vera. Og tað er stórur munur millum tað, sum føroysku feløgini vóna at fáa sum mótstøðulið, og marruna sum kann gerast veruleiki, um føroysku feløgini skulu spæla ímóti feløgum úr Eystureuropa.

B36 er við í lutakastinum til fyrsta innleiðandi umfarið í Europa Cup fyri meistaralið, og har skal rættuliga siglast millum sker og boggar, um B36 skal hava eitt gott lutakast. Møguligu mótstøðuliðini hjá B36 eru fleiri gamlir kenningar sum t. d. Skonto Riga og APOEZ Nicosia. Besta B36 lutakastið hevði verið ÍA úr Akranesi og finska meistaraliðið Tampere United. Írska meistaraliðið Shelbourne hevði eisini verið væl frægari enn øll hini. Tey eru eitt nú meistaraliðini úr Litava, Moldova, Georgia, Hvítarusslandi og Makedonia.

KÍ og GÍ eru við í UEFA Cup lutakastinum. Besta lutakastið hjá KÍ hevði ivaleyst verið OB úr Odense ella kanska heldur IFK Göteborg úr Svøríki. Hinir møguleikarnir eru gomlu KÍ kenningarnir Újepesti úr Ungarn og trý onnur feløg úr Eystureuropa.

GÍ hevur fýra møgulig mótstøðulið. Mest ynskiliga liðið hevði ivaleyst verið SK Brann úr Bergen. Hini eru pólska Arnka Wronki, Hajduk Split úr Kroatia og Ferencvárositc úr Ungarn.